KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 28.11.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 96/24 | 24/00926-31 | Fíggjarætlan 2025, Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* |
| 97/24 | 23/00804-16 | Val av tveimum umboðum í stýrið fyri sjálvsognarstovnin “Gloria Fastogn” |
| 98/24 | 21/01377-33 | Húsarhaldsskúli í Klaksvík, íløgustuðul – *seinna viðgerð* |
| 99/24 | 21/01280-333 | Byggibúningararbeiði, Útstykking á Fossum, meirveiting, *seinna viðgerð* |
| 100/24 | 23/01301-13 | Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 125a í Svínoy |
| 101/24 | 24/00720-8 | Umsókn um sundurbýti til 4 matrikuleindir á Trøllanesi (lutur 25b + matr.nr. 26) |
| 102/24 | 24/01114-3 | Marknaumskipan millum matr.nr. 797e og 805a í Klaksvík |
| 103/24 | 24/01220-1 | Matrikulering av leiguøki matr.nr. 1377d |
| 104/24 | 24/00530-4 | Umsókn um keyp av almennum vegøki at leggja saman við matr.nr. 1616 í Klaksvík |
| 105/24 | 24/00176-29 | Endurskoðan av almennu byggisamtyktini - Status |
| 106/24 | 24/00924-5 | Prísáseting fyri grundstykkir á Húsum |
| 107/24 | 23/00978-9 | Umsókn um loyvi til velting - Niðan Háls |
| 108/24 | 24/01145-1 | Víðkan av havna-/vinnuøki millum D7 á Strond og B14 í Ánunum |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 109/24 | 24/01142-1 | Eykajáttan, *seinna viðgerð* |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

## 96/24
## 24/00926-31 Fíggjarætlan 2025, Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.11.2024 | 99/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 96/24 |

**24/00926-31 Fíggjarætlan 2025, Klaksvíkar Býráð - Fíggjarnevnd og Býráð**

**Frágreiðing um málið:**
Hervið verður uppskot til fíggjarætlan 2024 lagt fyri fíggjarnevnd og Klaksvíkar Býráð til viðgerð og støðutakan.

Talvurnar niðanfyri eru úrslit frá temafundinum hin 22. november, har rakstur og íløgur vóru viðgjørdar. Inntøkurnar eru 381 mió. kr., rakstur 288 mió. kr., rentustuðul og rentur 19,4 mió. kr., íløgur 56 mió. kr. og avdráttir 17,6 mió. kr. Uppskotið javnvigar sostatt við kr. 0.

Skattaprosentið er óbroytt 20,75%, og barnafrádrátturin hækkar úr kr. 6.500 til 8.000.

| Rakstrarstað (1.000) | Uppruna ætlan 2024 | Broyting okt - nov 2024 | Æ2025 - Fín 26-11-2024 | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 352.700 | 28.396 | 381.096 | 8,1 |
| Rakstur | 273.469 | 14.547 | 288.016 | 5,3 |
| | 79.231 | 13.849 | 93.080 | 17,5 |
| Rentur og rentustuðul | 18.400 | 1.000 | 19.400 | 5,4 |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **60.831** | **12.849** | **73.680** | 21,1 |
| Íløgur | 53.517 | 2.563 | 56.080 | 4,8 |
| **Úrslit áðrenn avdráttir** | 7.314 | 10.286 | 17.600 | 140,6 |
| Avdráttir | 7.314 | 10.286 | 17.600 | 140,6 |
| **Úrslit** | **0** | **0** | **0** | |
| | | | | |
| Lyklatøl (%) | | | | |
| Lutfall rakstur og inntøkur | 77,5 | | 75,6 | |
| Lutfall rakstur+rentur og inntøkur | 82,8 | | 80,7 | |

Inntøkurnar eru mettar til 381 mió. kr., sum er 12 mió. kr. hægri, enn framskriving av inntøkunum í ár vísir. Vøksturin er 3,2%.

Raksturin er settur til 288 mió. kr., sum er 14,5 mió. kr. hægri enn í upprunaætlanini 2024. Vøksturin er 5,3%.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

| Rakstrarstað | Uppruna ætlan 2024 | Broyting okt - nov 2024 | Uppskot ætlan 2025 | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| Skattainntøkur | 352.700.000 | 28.396.000 | 381.096.000 | 8,1 |
| | | | | |
| Kommunufyrisiting | 28.621.000 | 2.310.000 | 30.931.000 | 8,1 |
| Almanna- og heilsumál | 103.783.000 | 6.702.000 | 110.485.000 | 6,5 |
| Børn og ung | 61.368.000 | 2.695.000 | 64.063.000 | 4,4 |
| Undirvísing | 14.859.000 | 464.000 | 15.323.000 | 3,1 |
| Mentan og frítíð | 19.355.000 | 2.465.000 | 21.820.000 | 12,7 |
| Teknisk mál | 27.881.000 | -407.000 | 27.474.000 | -1,5 |
| Kommunal virki | 17.902.000 | 18.000 | 17.920.000 | 0,1 |
| | 273.769.000 | 14.247.000 | 288.016.000 | 5,2 |
| | | | | |
| | 78.931.000 | 14.149.000 | 93.080.000 | 17,9 |
| | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 7.000.000 | 0 | 7.000.000 | 0,0 |
| | | | | |
| Rentugjaldingar(útreiðslur) | 11.500.000 | 1.000.000 | 12.500.000 | 8,7 |
| Rentugjaldingar(inntøkur) | -100.000 | | -100000 | 0,0 |
| | 11.400.000 | 1.000.000 | 12.400.000 | 8,8 |
| | | | | |
| Samlaðar útreiðslur | 60.531.000 | 13.149.000 | 73.680.000 | 21,7 |
| | | | | |
| Íløgur | 53.517.000 | 2.563.000 | 56.080.000 | 4,8 |
| | | | | |
| Úrslit áðrenn avdráttir | 7.014.000 | 10.586.000 | 17.600.000 | 150,9 |
| | | | | |
| Avdráttir | 7.014.000 | 10.586.000 | 17.600.000 | 150,9 |
| | | | | |
| Úrslit eftir avdráttir | 0 | 0 | 0 | |

| Rakstrarstað | Ætlan 2024 | Meting 2025 | Hækking í mun til mettu inntøku 2024 | Uppskot ætlan 2025 | Broyting % |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 264.753.000 | 272.120.000 | 12.829.000 | 284.949.000 | 4,7 |
| Barmafrádráttur | | | -2.000.000 | -2.000.000 | |
| Kommunuskattur | 264.753.000 | 272.120.000 | 10.829.000 | 282.949.000 | 4,0 |
| Húsaleiguskattur | 0 | | | 0 | |
| Felagsskattur | 17.500.000 | 23.790.000 | -790.000 | 23.000.000 | -3,3 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 55.525.000 | 59.086.000 | 2.791.000 | 61.877.000 | 4,7 |
| Veiðigjald | 3.115.000 | 3.115.000 | 0 | 3.115.000 | 0,0 |
| Tøkugjald | | | | | |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | 11.807.000 | 10.999.000 | -844.000 | 10.155.000 | -7,7 |
| | 352.700.000 | 369.110.000 | 11.986.000 | 381.096.000 | 3,2 |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Her er útgreining av íløgunum, sum vórðu samtyktar á felags nevndarfundinum 22. november:

| Grein | Íløgur (kr. 1.000) | Æ 2025 |
|---|---|---|
| | | |
| 1 | Fastogn (býráðshúsið) | 2.700 |
| | | |
| 2 | NBH | 1.400 |
| | | |
| 3 | Útiøkið barnagarðar | 1.500 |
| | | |
| 5 | Húsarhaldsskúli | 330 |
| 5 | Varpið | 2.000 |
| 5 | Gólv og ljós í hallunum | 1.200 |
| 5 | Svimji/fimleikarhøll | 1.000 |
| 5 | Hornaskýlið | 6.300 |
| 5 | Graslíkisvøllur | 1.000 |
| | | 11.830 |
| | | |
| 6 | Sparkivallir/spælipláss | 400 |
| 6 | Byggibúning á Fossum | 2.000 |
| 6 | Byggibúning bústaðir | 2.000 |
| 6 | Kirkjugarður/ líkvognur | 1.600 |
| 6 | Vatnleiðingar | 800 |
| 6 | Spillivatnsútbygging (kloakk) | 5.600 |
| 6 | Lendisarbeiði viðv. nýggjum hotelli | 11.800 |
| 6 | Byggib miðbýur- skipan av parkering | 2.000 |
| 6 | Parkering/wc Árnafjørð | 900 |
| 6 | Vegur + parkeringspl. við Stangavegin | 3.750 |
| 6 | Vegir íløga | 4.800 |
| 6 | Maskinur íløga | 1.300 |
| | | 36.950 |
| | | |
| 7 | Renovatiónin | 200 |
| 7 | Bátafelagshús og sølutorg | 1.500 |
| | | 1.700 |
| | | |
| | Samanlagt | 56.080 |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Rakstur býttur á høvuðspostar:

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | 1.700.000 | 91.000 | 1.791.000 |
| Borgarstjórin | 1.000.000 | 53.000 | 1.053.000 |
| Val og valnevndir | 250.000 | -110.000 | 140.000 |
| Nevndir v.m. | 300.000 | -44.000 | 256.000 |
| Kommunubygningur | 939.000 | 226.000 | 1.165.000 |
| Kommunufyrisiting | 3.140.000 | 1.300.000 | 4.440.000 |
| Stjórnarskrivstova | 5.315.000 | 915.000 | 6.230.000 |
| Roknskapardeild | 1.930.000 | -729.000 | 1.201.000 |
| Tekniska deild | 5.351.000 | -57.000 | 5.294.000 |
| Byggi- og býarplansútreiðslur | 500.000 | -18.000 | 482.000 |
| Vinni- og mentanardeild | 2.000.000 | 229.000 | 2.229.000 |
| Trivnaðardeild | 1.800.000 | 351.000 | 2.151.000 |
| Miðlan | 1.351.000 | 230.000 | 1.581.000 |
| Umsiting annað | 900.000 | -127.000 | 773.000 |
| Leigusáttmáli Varpið | 980.000 | | 980.000 |
| Vitjanir og vinabýir | 50.000 | | 50.000 |
| Íverksetarahúsið (stuðulsv.) | 350.000 | | 350.000 |
| Kommunufeløg (KSF og KAF) | 765.000 | | 765.000 |
| Tænastumannaeftirlønir | 0 | | 0 |
| **Kommunufyrisiting** | **28.621.000** | **2.310.000** | **30.931.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Naina | 200.000 | | 200.000 |
| Kommunulæknar | 1.165.000 | 8.000 | 1.173.000 |
| Barnaheilsufrøðingar | 290.000 | | 290.000 |
| Sálarfrøðïngur | 0 | 300.000 | 300.000 |
| Skúlaheilsutænastan | 118.000 | | 118.000 |
| Skúlatannlæknar | 4.543.000 | 139.000 | 4.682.000 |
| Heilsunevndin - ymiskt | 200.000 | | 200.000 |
| Heilsunevndin - Virkið vár/Virkið heyst | 100.000 | | 100.000 |
| Ymiskur stuðul almanna/heilsu | 200.000 | | 200.000 |
| Matarskipan á Skúlatrøð | 1.925.000 | 41.000 | 1.966.000 |
| Stuðul innan almanna-& heilsumál | 1.500.000 | | 1.500.000 |
| Serflutningsskipanin | 411.000 | 22.000 | 433.000 |
| Integratión | 180.000 | | 180.000 |
| NR "Námsfrøðiliga ráðgevingin" | 3.418.000 | 274.000 | 3.692.000 |
| Barnaverndarstovuna Føroya | 300.000 | | 300.000 |
| Barnaverndin | 5.184.000 | 194.000 | 5.378.000 |
| Børn í fosturforeldraskipan | 2.156.000 | 84.000 | 2.240.000 |
| Stovnspláss og brúkaragjøld serstovur | 1.251.000 | | 1.251.000 |
| Kl.kom. Gjøld til NBH (Eldrasamstarv) | 80.002.000 | 5.940.000 | 85.942.000 |
| Frípláss | 340.000 | | 340.000 |
| **Almanna- og heilsumál** | **103.483.000** | **7.002.000** | **110.485.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Virkishúsið fyri ung | 3.296.000 | 120.000 | 3.416.000 |
| Ung í arbeiði | 500.000 | | 500.000 |
| Dagrøktin | 11.214.000 | -2.137.000 | 9.077.000 |
| Skipan barnaans. á Kalsoy (Húsar) | 400.000 | -400.000 | 0 |
| Fjallafípan | 6.439.000 | 1.761.000 | 8.200.000 |
| Blákollan | 4.477.000 | 586.000 | 5.063.000 |
| Barnahúsið Margit | 7.831.000 | 658.000 | 8.489.000 |
| Dr. Margrethu Barnagarður | 11.228.000 | -475.000 | 10.753.000 |
| Mylnuhúsið | 5.308.000 | 460.000 | 5.768.000 |
| Baldursbrá (Norðoyri) | 3.245.000 | 787.000 | 4.032.000 |
| Blómugarður Kalsoy | | 971.000 | 971.000 |
| Frítíðarskúlin (Snjalla Bjalla) | 5.888.000 | 651.000 | 6.539.000 |
| Barnaansing felags | 1.542.000 | -287.000 | 1.255.000 |
| **Børn og ung** | **61.368.000** | **2.695.000** | **64.063.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Skúlatrøð | 5.671.000 | 47.000 | 5.718.000 |
| Skúlin í Árnafirði | 13.000 | | 13.000 |
| Skúlin í Mikladali og Trøllanesi | 29.000 | | 29.000 |
| Skúlin Svínoy | 5.000 | | 5.000 |
| Skúlin á Húsum, Kalsoy | 56.000 | 592.000 | 648.000 |
| Reingerð skúlabygningar | 4.075.000 | | 4.075.000 |
| Skúlabarnaflutningur & Vistarhald | 178.000 | | 178.000 |
| Næmingagjald | -425.000 | -225.000 | -650.000 |
| Skúlabygningar | 4.827.000 | 50.000 | 4.877.000 |
| Endurgjald til lærlingaútreiðslur | 430.000 | | 430.000 |
| **Undirvísing** | **14.859.000** | **464.000** | **15.323.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| **Húsarhaldsskúlin** | | | |
| Tónlistaskúlin | 2.351.000 | 15.000 | 2.366.000 |
| Kvøldskúlin | 657.000 | 82.000 | 739.000 |
| Vevskúlin | 77.000 | | 77.000 |
| Handarbeiðsskúlin | 287.000 | 20.000 | 307.000 |
| Jóla- og nýttárshald | 395.000 | 2.000 | 397.000 |
| Norðoyastevnan | 350.000 | 2.000 | 352.000 |
| Ym. tilboð/tiltøk mentan/frítíð | 150.000 | | 150.000 |
| Summarfestivalur/Sjómannadagur v.m. | 705.000 | | 705.000 |
| Skoytubreyt | 350.000 | 16.000 | 366.000 |
| Vitjanir & Vinarbýir | 0 | | 0 |
| Stuðul til ítrótt | 308.000 | | 308.000 |
| Stuðul til mentan | 5.155.000 | 2.023.000 | 7.178.000 |
| Bókasavnið | 2.282.000 | 68.000 | 2.350.000 |
| Svimjihøllin | 2.422.000 | 141.000 | 2.563.000 |
| Ítróttarhallir | 1.916.000 | 48.000 | 1.964.000 |
| Stadionøkið | 1.950.000 | 47.000 | 1.997.000 |
| **Mentan og frítíð** | **19.355.000** | **2.464.000** | **21.819.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna-ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Fastognir | 2.929.000 | 41.000 | 2.970.000 |
| Fastognir - Biskupstorg veghædd (rakstur) | -154.000 | 0 | -154.000 |
| Fastognir Reingerð | 647.000 | -647.000 | 0 |
| Sparkivallir/Spælipláss | 201.000 | | 201.000 |
| Býarfríðkan | 2.377.000 | 59.000 | 2.436.000 |
| Kirkjugarðar | 2.125.000 | 67.000 | 2.192.000 |
| Líkvognar | 108.000 | 4.000 | 112.000 |
| Fjarhiti | -150.000 | -350.000 | -500.000 |
| Umhvørvistiltøk | 503.000 | 1.000 | 504.000 |
| Vatnveitingar | 3.580.000 | 91.000 | 3.671.000 |
| Kloakkir | 1.454.000 | 40.000 | 1.494.000 |
| Ferðsluregulering | 731.000 | 21.000 | 752.000 |
| Vegir | 4.947.000 | 152.000 | 5.099.000 |
| Vegir (Asfalteringsviðlíkahald) | 4.024.000 | 9.000 | 4.033.000 |
| Gøtusóping og reinhald | 928.000 | 10.000 | 938.000 |
| Kavarudding | 1.119.000 | 31.000 | 1.150.000 |
| Gøtuljós | 1.790.000 | | 1.790.000 |
| Smiðjan | 163.000 | 62.000 | 225.000 |
| Bygningur hjá vegadeild og smiðja | 481.000 | | 481.000 |
| Maskinur | 78.000 | 2.000 | 80.000 |
| **Teknisk mál** | **27.881.000** | **-407.000** | **27.474.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna- ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Renovatión | 1.838.000 | 63.000 | 1.901.000 |
| IRF | 10.340.000 | 300.000 | 10.640.000 |
| Sløkkiliðið | 2.402.000 | -95.000 | 2.307.000 |
| Grótbrotið | -449.000 | 34.000 | -415.000 |
| Moldgoymslan | 257.000 | | 257.000 |
| Vinnumenning | 850.000 | 14.000 | 864.000 |
| Talgildu Føroyar | 250.000 | | 250.000 |
| Havnin | -1.944.000 | -306.000 | -2.250.000 |
| Bussleiðin (Innan kom.mark) | 3.800.000 | | 3.800.000 |
| Farleiðir (Uttanb.koyr.Leið 400 v.m.) | 250.000 | | 250.000 |
| Parkeringsskipanin | 308.000 | 8.000 | 316.000 |
| **Kommunal virki** | **17.902.000** | **18.000** | **17.920.000** |
| | | | |
| **§§ 1-7 samanlagt** | **273.469.000** | **14.546.000** | **288.015.000** |

| Rakstrarstað | Uppruna- ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Stuðul til rentuútreiðslur | 7.000.000 | | 7.000.000 |
| | | | |
| | 280.469.000 | 14.546.000 | 295.015.000 |

| Rakstrarstað | Uppruna- ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Rentugjaldingar(útreiðslur) | 11.500.000 | 1.000.000 | 12.500.000 |
| Rentugjaldingar(inntøkur) | -100.000 | | -100.000 |
| Rentupostar | 11.400.000 | 1.000.000 | 12.400.000 |
| | | | |
| | 291.869.000 | 15.546.000 | 307.415.000 |

| Rakstrarstað | Uppruna- ætlan 2024 | Broyting | Uppskot ætlan 2025 |
|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | -264.753.000 | -20.196.000 | -284.949.000 |
| Barnafrádráttur | | 2.000.000 | 2.000.000 |
| Húsaleiguskattur | 0 | | 0 |
| Felagsskattur | -17.500.000 | -5.500.000 | -23.000.000 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | -55.525.000 | -6.352.000 | -61.877.000 |
| Veiðigjald | -3.115.000 | | -3.115.000 |
| Tøkugjald | | | 0 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | -11.807.000 | 1.652.000 | -10.155.000 |
| Skattainntøkur | -352.700.000 | -28.396.000 | -381.096.000 |
| | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **-60.831.000** | **-12.850.000** | **-73.681.000** |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Nettoskuld**
Sum kunnugt, fór nettoskuldin upp um eina álíkning í 2021, men í 2023 var komið undir skuldarmarkið aftur, og útrokning i oktober vísti, at við ársenda 2024 eru vit 15 mió. kr. undir skuldarmarkinum.

Sostatt hevur kommunan hildið avtaluna við FMR, dagfest 6. desember 2021 ísbv. lántøku. Lántøkan var treytað av, at kommunan kom undir loyvda skuldarmarkið í seinasta lagi 31. desember 2024. Hetta varð endurtikið ísbv. lántøkurnar í mai 2022 og í januar 2023.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Tað er týdningarmikið, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í arbeiðið við fíggjarætlanini fyri 2025, og at havt verður í huga langtíðaravleiðingar í bæði rakstrarpartinum og íløgupartinum við atliti at burðardyggari menning av Klaksvíkar kommunu. Neyðugt er at tryggja, at grundleggjandi tænastur til borgarar og onnur í kommununi verða tryggjaðar á haldførari grund, og at íløgur taka støði í tøka fíggjarliga tilfeinginum og í framtíðartørvinum í kommununi

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, grein 39

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verandi uppskot vísir 17,6 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir.

Lániavtalurnar leggja upp til, at rindast skulu 18,6 mió. kr. í avdráttum, og tí hevur fíggjarætlanin 1 mió. kr. í likviditetshalli.

Á summum økjum eru avsetingarnar í minna lagi, og tí verður tað avbjóðandi hjá umsitingini at halda játtanirnar.

Inntøkurnar hava verið góðar seinastu árini, men ein skal vera varin við at rokna við munandi meirinntøkum, sum búskaparútlitini eru í løtuni.

Tá gjaldførið er tepurt, og nakrar av skattainntøkunum verða avroknaðar síðst í árinum, er nógv, sum bendir á, at vit ikki sleppa undan lántøku í 2025.

**Tilmæli:**
Frammanfyri lýsta uppskot til fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til viðgerðar og støðutakan. Skattaprosent og barnafrádráttur skulu eisini ásetast. Í verandi uppskoti er skattaprosentið óbroytt 20,75%, meðan barnafrádrátturin er hækkaður kr. 1.500 til kr. 8.000

**Fíggjarnevndin 26. november 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-11-2024, og beinir málið í býráðið til endaliga samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. november 2024; tað varð samtykt 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL og ÓML), ongari atkvøðu ímóti; SVJ og ASB atkvøddu ikki.

Sostatt er fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2025 samtykt við hesum tølum:

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar kommuna, fíggjarætlan 2025**

| | | tkr. |
|---|---|---|
| | **Inntøkur** | **381.096** |
| § 1 | Kommunufyrisiting | 30.931 |
| § 2 | Almanna- og heilsumál | 110.485 |
| § 3 | Børn og ung | 64.063 |
| § 4 | Undirvísing | 15.323 |
| § 5 | Mentan og frítíð | 21.820 |
| § 6 | Teknisk mál | 27.474 |
| § 7 | Kommunal virki | 17.920 |
| | **Rakstrarútreiðslur** | **288.016** |
| | **Rakstraravlop** | **93.080** |
| | Rentustuðul | 7.000 |
| | Rentugjaldingar (útreiðslur) | 12.500 |
| | Rentugjaldingar (inntøkur) | 100 |
| | | 12.400 |
| | Úrslit áðrenn íløgur | 73.680 |
| | Íløgur | **56.080** |
| | Úrslit áðrenn avdráttir | 17.600 |
| | Avdráttir | 17.600 |
| | Úrslit eftir avdráttir | 0 |

| | **Útgreining (íløgur)** | **tkr.** |
|---|---|---|
| § 1 | Fastogn (býráðshúsið) | 2.700 |
| § 2 | NBH | 1.400 |
| § 3 | Barnaansing | 0 |
| § 3 | Fjallafípan uttanumøkið | 0 |
| § 3 | Nýgerð av Fjallafípuni | 0 |
| § 3 | Útiøkið barnagarðar | 1.500 |
| § 4 | Útiøki á Skúlatrøð | 0 |
| § 5 | Varpið | 2.000 |
| § 5 | Húsarhaldsskúli | 330 |
| § 5 | Dypparaneyst/havsvimjarar | 0 |
| § 5 | Bókasavn (rúmið) | 0 |
| § 5 | Hornaskýlið | 6.300 |
| § 5 | Graslíkisvøllur | 1.000 |
| § 5 | Gólv og ljós í hallunum | 1.200 |
| § 6 | Sparkivallir/spælipláss | 400 |
| § 6 | Svimji-/fimleikarhøll | 1.000 |
| § 6 | Byggibúning á Fossum | 2.000 |
| § 6 | Byggibúning bústaðir | 2.000 |
| § 6 | Vatnleiðingar | 800 |
| § 6 | Vatnleiðing til tunnil Norður um Fjall | 0 |
| § 6 | Kirkjugarður/ líkvognur | 1.600 |
| § 6 | Spillivatnsútbygging (kloakk) | 5.600 |
| § 6 | Ídnaðarøkið undir Hamri | 0 |
| § 6 | Lendisarbeiði viðv. nýggjum hotelli | 11.800 |
| § 6 | Róðrarneystið | 0 |
| § 6 | Byggib miðbýur- skipan av parkering | 2.000 |
| § 6 | Parkering/wc Árnafjørð | 900 |
| § 6 | Vegir - ferðslutrygd | 0 |
| § 6 | Stangavegur | 0 |
| § 6 | Vegur + parkeringspl. við Stangavegin | 3.750 |
| § 6 | Vegir íløga | 4.800 |
| § 6 | Maskinur íløga | 1.300 |
| § 6 | Gøtuljós | 0 |
| § 6 | Smiðjan, sveisirúm | 0 |
| § 7 | Renovatiónin | 200 |
| § 7 | Bátahylur Borðoyarvík | 0 |
| § 7 | Kaisíðan í Árnafirði | 0 |
| § 7 | Víðkan av øki í Norðhavnini | 0 |
| § 7 | Bátafelagshús og sølutorg | 1.500 |
| § 7 | Bátadráttur úti í Klaksvík | 0 |
| | Samanlagt | 56.080 |

Síðani varð atkvøtt um at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75** og einum **barnafrádrátti** upp á **8.000 kr.**; tað varð einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 97/24
## 23/00804-16 Val av tveimum umboðum í stýrið fyri sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 97/24 |

**23/00804-16 Val av tveimum umboðum í stýrið fyri "Gloria Fastogn"**

**Frágreiðing um málið:**
Á býráðsfundinum 31. oktober samtykti býráðið at bíða við at velja kommunalu umboðini í stýrið fyri sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn" til eftir kommunuvalið. Nú valið hevur verið, verður hetta málið lagt fyri býráðið at velja tvey umboð í stýrið fyri sjálvsognarstovnin, har umboðini hjá kommununi verða forfólkið í TrN E&B og eitt fólk afturat.

**Lógargrundarlag:**
Samtyktirnar fyri sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn", í § 3 um leiðslu, áseta, at "grunnurin verður umsitin av einum stýri við 5 limum, sum eru valdir soleiðis: *Tveir limir verða valdir av stýrinum fyri sjálvsognarstovnin Soli Deo Gloria, *Tveir limir verða valdir av Klaksvíkar býráð, *Ein limur verður valdur í felag av omanfyri nevndu fýra limum. Hesin fimti limurin skal vera óheftur av bæði Soli Deo Gloria og Klaksvíkar kommunu."

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri býráðið at velja tvey umboð í stýrið fyri sjálvsognarstovnin"Gloria Fastogn", har umboðini hjá kommununi verða forfólkið í TrN E&B og eitt fólk afturat.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Málið útsett til fyrsta fund í 2025.

## 98/24
## 21/01377-33 Húsarhaldsskúli í Klaksvík, íløgustuðul – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 85/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 85/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 98/24 |

**21/01377-33 Húsarhaldsskúli í Klaksvík - Íløgustuðul**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 31. oktober 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Hetta málið stuðlar undir 3. heimsmálið, sum skal tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Upphæddin verður at fíggja av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at eykajátta kr. 1.263.563 í íløgustuðuli til Húsarhaldsskúlan.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 24-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá BýR 31-10-2024 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 99/24
## 21/01280-333 Byggibúningararbeiði, Útstykking á Fossum – meirveiting, *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 100/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 23.10.2024 | K-29/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 90/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 87/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 99/24 |

**21/01280-333 Byggibúningararbeiði - Útstykking á Fossum - meirveiting**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 31. oktober 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja undirstøðukervi í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsetingin til *Byggibúning sethús* hevur pr. 14-10-2024 eitt yvirtrekk upp á 3,8 mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Málið um almennar leiðingar kostar sambært meting frá arbeiðstakara | kr. | 3.000.000,- |
| Annað neyðugt arbeiði í 2024 | - | 600.000,- |
| Endurgjald frá SEV fyri leiðingar og tøknihús | - | -1.500.000,- |
| Munur hjá kommununi at gjalda | kr. | 2.100.000,- |

_ _ _

Mett yvirtrekk á kontuni *Byggibúning Bústaðir* í 2024 verður sambært hesum (avrundað) 6,0 mió. kr.

Mettar inntøkur frá grundstykkjasølu í ár á Fossum
Grundstykkir 9 stk. á 450 tkr. -4,1 mió. kr.
Raðhúsastykkir 13 stk. á 250 tkr. -3,2 mió. kr.
Avlop, um grundstykkjasøla verður tikin við 1,3 mió. kr.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri standandi frágreiðing verður mælt viðkomandi nevndum og býráði til at geva fyrisitingini heimild til at seta arbeiðið at fremja almennar leiðingar á Fossum í gongd.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-10-2024.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2024:**
Tilmælið, dagf. 14-10-2024, verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá BýR 31-10-2024 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 100/24
## 23/01301-13 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 125a í Svínoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Svínoyarnevndin | 07.11.2024 | 23/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 108/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 100/24 |

**23/01301-13 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 125 í Svínoy**

**Frágreiðing um málið:**
Í umsókn frá 4. sept. 2024 verður søkt um sundurbýti av matr.nr. 125a í Svínoy.
Biðið verður um, at lutur 1 (2177 $m^2$), lutur 2 (3145 $m^2$) og lutur 3 (3306 $m^2$) verða skrásettir við hvør sínum sjálvstøðugum matrikulnummari. – Grundgeving er nevnd í umsóknini.




Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarlig viðurskifti: Í samtykta byggisamtyktaruppskotinum, sum verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar ein at komandi døgunum liggur **<u>lutur 1,</u>** sum er 2177 m$^2$ til víddar, partvís í økisparti F2 (frítíðarøki) – ætlað m.a. til bygging av frítíðarhúsum og partvís í landbúnaðarøki, **lutur 2** í landbúnaðarøki og **lutur 3** partvís í D43 (grønt øki) og partvís í landbúnaðarøki




**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu í umbúna fyri Svínoy

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi

**Tilmæli:**
Vísandi til grundgevingar fyri umsóknini og bert partvís samsvar millum umsókn og samtykta byggisamtyktaruppskotið, skjýtur Tekniska Umsiting upp at viðmæla sundurbýti av matr.nr. 125 í Svínoy í 3 sjálvstøðugar matriklar, við teirri viðmerking og kunning til umsøkjaran, at nýtslan av teimum einstøku lutunum til eina og hvørja tíð verður at samsvara við galdandi byggisamtykt.
(Møgulig seinni broyting í byggisamtyktini verður at taka upp sum sjálvstøðugt mál, tá ella um hetta verður aktuelt)

**Svínoyarnevndin 7. november 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TF, dagf. 24-10-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 7. nov. 2024.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá UBN 18-11-2024 einmælt samtykt.

## 101/24
## 24/00720-8 Umsókn um sundurbýti til 4 matrikuleindir á Trøllanesi (lutur 25b + matr.nr. 26)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trøllanesnevndin | 06.11.2024 | 12/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 109/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 101/24 |

**24/00720-8 Umsókn um sundurbýti til 4 matrikuleindir á Trøllanesi (lutur 25b+matr.nr. 26)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið er framhald av viðgerð á seinasta fundi um “Sundurbýti og samanlegging á Trøllanesi – matr.nr. 25, 26 og 18”

Í upprunaumsóknini vantaði korttilfar við lýsing av sundurbýtinum av matr.nr. 26 + lut 25b í 4 lutir. Hetta bleiv sent kommununi seinni, og verður tí latið avvarðandi nevndum til viðgerðar í hesum umfarinum.

Upprunaumsóknin leggur upp til samanlegging av matr.nr. 26 og luti 25b, sum víst niðanfyri:




meðan framhaldsmálið snýr seg um sundurbýti av samanløgdu lutunum í 4 eins stórar partar.
Sí kortlýsing niðanfyri:




Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga er talan um økispart A28 (Blandað bygging – ætlað vanligum sethúsum og samanbygdari lágari bygging).
Minsta grundøkjavídd 300 $m^2$ fyri vanlig sethús og 200 $m^2$ fyri samanbygd hús.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Umsóknin er í tráð við galdandi ásetingar í byggisamtyktini, og mælir Tekniska Umsiting tí til at viðmæla sundurbýtinum.

**Trøllanesnevndin 6. november 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF, dagf. 28-10-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Nevndin tekur undir við Trøllanesnevndini 6. nov. 2024.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá UBN 18-11-2024 einmælt samtykt.

## 102/24
## 24/01114-3 Marknaumskipan millum matr.nr. 797e og 805a í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 113/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 102/24 |

**24/01114-3 Sundurbýti við eftirfylgjandi samanlegging – partur av matr.nr. 805a við matr.nr. 797e í Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður tann 11. okt. 2024 um kommununnar ummæli til sundurbýti av parti av matr.nr. 805a til samanleggingar við matr.nr. 797e í Klaksvík.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

Byggisamtyktarliga liggur matr.nr. 805a í økisparti A8 (blandað (tøtt)bygging), meðan matr.nr. 797e liggur partvís í A8 og partvís í økisparti A4 (blandað bygging).

Sjálv umskipanin fer fram innanfyri sama økispart (A8) og ber í sær, at matr.nr. 797e verður víðkað við 60 fermetrum, samstundis sum skapið verður meira regulert.




**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Burðardyggir býir og býlingar

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
Ongar – kommunan bert tilmælandi

**<u>Tilmæli:</u>**
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-11-2024.

**<u>Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:</u>**
Tilmælið frá UBN 18-11-2024 einmælt samtykt.

## 103/24
## 24/01220-1 Matrikulering av leiguøki matr.nr. 1377d

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 116/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 19.11.2024 | 61/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.11.2024 | 97/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 103/24 |

**<u>24/01220-1 Matrikulering av leiguøki matr.nr. 1377d</u>**

**<u>Frágreiðing um málið:</u>**
Leigusáttmálin millum Klaksvíkar kommunu og Húsarhaldsskúla Føroya er undirskrivaður 24. juni 2020, men ikki tinglisin.

Leigusáttmálin frá juni 2020 snýr seg um matr.nr. 1377d, og uppgivna leiguvíddin er 2350 $m^2$, sum ikki er í samsvar við verandi vídd av matr.nr. 1377d - (verandi vídd 316 $m^2$)
Fyri at skipa leigulendið undir Húsarhaldsskúlanum so tað kemur at samsvara við veruleikan, er neyðugt at heita á Umhvørvisstovuna um matrikulumskipan, samstundis sum økið verður tillagað innanfyri góðkenda byggifeltið.
Leiguvídd (matr.nr. 1377d) eftir tillaging verður við hesum uml. 1400 $m^2$ (mark sett 1 metur útfrá útsíðu útvegg)







Regulerað leiguøki hjá Húsarhaldsskúla Føroya (matr.nr. 1377d) – mark sett ein metur frá útveggi

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr 11 – Burðardyggir býir og býlingar

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Serstaka Byggisamtyktin fyri E1-miðbýarøkið
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Matrikulútreiðslur sum verða goldnar av leiguinntøkuni. Árlig leiguinntøka uml. kr. 77.000,-

**Tilmæli:**
Verður tikið undir við omanfyrinevnda verður
- umsókn um matrikulumskipan skjótast møguligt send Umhvørvisstovuni til góðkenningar
- átekning til leigusáttmálan frá 24. juni 2020 undirskrivað av útleigara og leigara og send til tinglýsingar, tá matrikulin er góðkendur

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-11-2024.

**Mentanarnevndin 19. november 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 18-11-2024

**Fíggjarnevndin 26. november 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 19-11-2024.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá FíN 26-11-2024 einmælt samtykt.

## 104/24
## 24/00530-4 Umsókn um keyp av almennum vegøki at leggja saman við matr.nr. 1616 í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 110/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 20.11.2024 | 63/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 104/24 |

**24/00530-4 Umsókn um keyp av almennum vegøki at leggja saman við matr.nr. 1616 í Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Eigarin hevur spurt seg fyri um møguleikan at keypa kommunala geiran norðanfyri sethúsaogn sína, matr.nr. 1616 í Klaksvík. (víst við bláum á kortinum)

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
- *Byggisamtyktarliga er talan um økispart A10, útlagt til blandaða bygging (bústaðir og lættari vinnu)*
- *Umsókta øki er matrikulerað sum almennur vegur – ætlað sum vegatkoma til trøðna omanfyri.*
- *Umsøkjarin søkti um sama øki í ár 2000, - tá samtykti Tekniska Nevnd ikki at selja*

Verður geirin seldur, má vegatkoman til trøðna staðfestast aðrar vegir. Til dømis:
1. Servituttur um almennan ferðslurætt verður tinglisin á lendi, sum selt verður, ella

2. Allir eigararnir av trøðni undirskriva ferðslurætt gjøgnum niðasta part av matr.nr. 1617a (gjøgnum tann partin, sum uppruna-uppskotið vísir sum parcel 4 (punkterað við reyðum á kortinum – evt. ferðslurættur punkterað við bláum)






*Uppruna-útstykkingarætlan*

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Verður samtyktin um ikki at selja broytt, mælir Tekniska Umsiting til, at hetta verður treytað av, at ferðslurættur til trøðna verður tinglisin, - antin sambært pkt. 1 ella 2 í tekstinum omanfyri.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Nevndin tekur undir við at selja umsøkjara kommunala geiran norðanfyri matr.nr. 1616 men við teirri treyt, at servituttur um almennan ferðslurætt verður tinglisin á lendið (víst verður til pkt. 1 í tilmælinum, dagf. 08-11-2024).

**Tekniska Nevnd 20. november 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 18-11-2024.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá TN 20-11-2024 einmælt samtykt.

# 105/24
# 24/00176-29 Endurskoðan av almennu byggisamtyktini - status

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | K-45/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 105/24 |

**24/00176-29 Endurskoðan av almennu byggisamtyktini - status**

**Frágreiðing um málið:**
Fyri at dagføra býarplanin og byggisamtyktina við endamálinum at skapa fleiri og fjølbroyttari bústaðir í kommununi er neyðugt at hava eitt grundarlag at taka støðu út frá. Hetta hevur byggibólkurin roynt at fingið í lag saman við ráðgevanum SNA við at fylgja eini greiðari og skipaðari tilgongd, ið inniber eina kanningarfasu og eina planleggingarfasu.

Byrjað varð við kanningarfasuni, har arbeitt hevur verið við at savna hagtøl, demografiskt data, spurnarkanning osfr.

Byggibólkurin og SNA eru nú so smátt byrjað upp á planleggingarfasuna (tillaging av býarplaninum, ætlan fyri fortætting, og ásetingar og byggisamtyktir).

Hvar er byggibólkurin so komin í dag sambært málsetninginum?
Byggibólkurin fer at fremja nøkur ítøkilig tiltøk innan 1. stig. ísb. við byggisamtyktarbroyting*, annars hevur verið hugt at kommunalum lendi, ið kann bjóðast út til meira fjølbroytta bygging.

*Í næstum verður almenn lýsing av fleiri byggisamtyktarbroytingum, ið koma at lata upp fyri fleiri møguleikum innan bygging, t.d. dagføra almenna ásetingartekstin í byggisamtyktini sambært bygningskunngerðini, BK17, í eini útstykkingarætlan kann partur av eini grundøkjavídd liggja í felagsøki, og loyva smærri búeindir í A-økjum í Klaksvík.
Ætlanir, ið stuðla undir 2. og 3. stig í málsetninginum, kemur byggibólkurin nærri inn á seinni í planleggingarfasuni.

**Burðardygd og heimsmálini:**
*7. Mál. Tryggja, at øll fáa álítandi, burðardygga og tíðarhóskandi orku, sum øll hava ráð til.*
*9. Mál. Byggja sterk undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan.*
*11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið er fíggjað innan *Byggi- og býarplansútreiðslur*.

**Tilmæli:**
Til kunning.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Tilmælið, dagf. 11-11-2024, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Býráðið varð kunnað um status við arbeiðinum at endurskoða almennu byggisamtyktina.

## 106/24
## 24/00924-5 Prísáseting fyri grundstykkir á Húsum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Húsanevndin | 06.11.2024 | 14/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 111/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.11.2024 | 96/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 106/24 |

**24/00924-5 Prísáseting fyri grundstykkir á Húsum**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við at Klaksvíkar býráð tann 14. okt. 2024 samtykti at útstykkja matr.nr. 43c á Húsum í trý grundstykkir á uml. 350 $m^2$, er neyðugt at staðfesta fermetraprís fyri grundstykkini, áðrenn ein útlutan (og søla) kann fremjast.

Niðanfyri eru útreiðslurnar ísb. við keyp av lendi, íbinding og matrikulering lýstar:

| | | |
|---|---|---|
| **43c á Húsum** | | |
| Samla vídd | 1047 | m2 |
| Keypt fyri | 180.000 | kr. |
| | | |
| Íbinding á Kalsoy | 50 | kr./m2 |
| Samlað íbindingargjald sbrt. vídd | 52.350 | kr. |
| | | |
| Tils. | 232.350 | kr. |
| | | |
| Matrikul útreiðslur | | |
| Grundgjald | 4.000 | kr. |
| Gjald pr. lut (3000 kr.) | 9.000 | kr. |
| 2% av marknaðarvirði (100% 3 stk.) | 4.647 | kr. |
| Tils. | 17.647 | kr. |
| | | |
| | | |
| Samlaðu útreisðlur av útstykkingini | 249.997 | kr. |
| Útreiðlsur pr. m2 | 239 | kr. |
| Fermetraprísur á | **~ 240** | kr. |

Umsitingin metir ikki, tað er ráðiligt at áseta ein lægri fermetraprís enn 240 kr/$m^2$, um útstykkingin skal vera uttan fíggjarmiss.
Talan er um neyðugar útreiðslur ísb. við útstykkingina, ið ikki slepst undan.

Dømi: Hetta merkir, at eitt grundstykki á Húsum uppá uml. 350 $m^2$ kemur at kosta uml. kr. 84.000,-.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11. Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar.

**Lógargrundarlag:**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
Reglugerð fyri grundstykkjalistan
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Konta *byggibúning bústaðir*.

Útreiðslur ísb. við útstykkingina skulu fíggjast av søluni.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at selja nýggju grundstykkini í útstykkingini á matr.nr. 43c á Húsum fyri 240 kr/$m^2$.

**Húsanevndin 6. november 2024:**
Nevndin mælir til, at grundstykkjakostnaðurin verður settur til 100 kr./fermetur á Húsum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL og EÓP, tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-10-2024.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við Húsanevndini 6. nov. 2024.

**Fíggjarnevndin 26. november 2024:**
Nevndin mælir til, at matr.nr. 43c verður býtt í tvey grundstykkir, og at fermetrakostnaðurin verður 240 kr.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá FíN 26-11-2024 samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL og ÓML), 1 atkvøðu ímóti (SVJ); ASB atkvøddi ikki.

## 107/24
## 23/00978-9 Umsókn um loyvi til velting - Niðan Háls

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 107/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 20.11.2024 | K-18/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 20.11.2024 | K-36/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 107/24 |

**23/00978-9 Umsókn um loyvi til velting - Niðan Háls**

**Frágreiðing um málið:**
Fundur hevur verið við festararnar um veltiætlanina. Niðurstøðan var, at festararnir framvegis ynskja, at økisparturin A31 verður strikaður, og at økisparturin D39 verður sleptur ella tillagaður, soleiðis at tað lendið, ið ætlað til innangarðs, kemur at liggja í landbúnaðarøki. Ella at eitt 25 áramálsskeið verður lýst yvir økispartarnar til frama fyri landbúnaði. 25 áramálsskeiðið er treytað av, at aðrir myndugleikar (US og BSt.) góðkenna veltiverkætlanina og nýggju innleggingina av innmørk. Áramálið á 25 ár kemur av afturberingartíðarskeiðinum fyri stuðul frá Búnaðargrunninum.

Sambært matrikullógini kann nýggj innangarðsjørð ikki útleggjast í bústaðaøki.




*Punkteraða reyða linjan vísir uppskot til ætlaðu innangarðsjørð sambært galdandi byggisamtykt.*

Í samband við endurskoðanina av býarplaninum fyri kommununa er umsitingin sinnað at hyggja nærri at møguleikanum at umskipa byggilendið/bústaðarøkið A31 aðrastaðir í kommununi.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar
Mál 15: Lív á landi

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.,.
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.,.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar beinleiðis

**Tilmæli:**
Umsóknin verður løgd fyri nevnd og býráð til umrøðu og støðutakan.

a) Um økisparturin A31 skal strikast og D39 umskipast,
b) ella lýsa eitt 25 áramálsskeið, ið loyvir landbúnaði í A31 og D39,
c) ella umsóknin um strikan av A31 og tillaging av D39 verður tikið upp ísb. við endurskoðanina av býarplaninum 2025.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Nevndin tekur undir við punkt c í tilmælinum, dagf. 08-11-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 20. november 2024:**
Málið verið til kunningar.

**Tekniska Nevnd 20. november 2024:**
Tilmælið, dagf. 08-11-2024, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Tilmælið frá TN 20-11-2024 einmælt samtykt.

## 108/24
## 24/01145-1 Víðkan av havna-/vinnuøki millum D7 á Strond og B14 í Ánunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ánanevndin | 05.11.2024 | 9/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2024 | 115/24 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 20.11.2024 | 45/24 |
| 4 Tekniska Nevnd | 20.11.2024 | 65/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | 108/24 |

**24/01145-1 Víðkan av havna-/vinnuøki millum D7 á Strond og B14 í Ánunum**

**Frágreiðing um málið:**
Nýtt havna-/vinnuøki og byggisamtykt:
Klaksvíkar kommuna hyggur støðugt eftir hóskandi økjum, har skapast kunnu karmar í einari kommunu í menning, og hevur hetta nú ført til, at hugt hevur verið eftir økinum millum Strond og Norðhavnina.

Nú fer kommunan víðari við málinum, og farið verður tí undir neyðugar fyrireikingar til skipan av einum nýggjum øki í býarætlanini, sum skal kunna hýsa ymiskum virksemi, tó mest innan havnavinnuna. Pláss skal eisini verða fyri øðrum virksemi, sum hoyrir heima í kommununi. Avgjørt er, at kommunan hyggur eftir økinum millum neystini á Strond (øki D7 í býarætlanini) og Norðhavnina (B14).




Í fyrsta umfari verður arbeitt við einum uppskoti um eina nýggja byggisamtykt fyri økið, og tá málið er klárt, verður eitt tilmæli lagt fyri allar viðkomandi nevndir og býráð. Síðani verður hoyring og góðkenning á skránni.

Býggibúningararbeiðið:
Kommunan hevur fylgt við, hvussu økir aðrastaðni verða útfylt, m.a. við sandi ella við avlopstilfari og gróti. Spurningin um at nýta grót og avlopstilfar til at fylla út á sjógv verður eisini kannaður. Hugsanin er, at atkomuvegurin til neystini á Strond verður arbeiðsvegur, tá eitt møguligt útfyllingararbeiði fer í gongd, og at tað síðani verður fylt út frá neystaøkinum og suðureftir komandi árini.

Málið krevur, at arbeiðið verður framt á slíkan hátt, at vart verður ímóti allari dálking. Í hesum sambandi er neyðugt við einari umhvørvisgóðkenning.

Ætlanin víðari er, at kommunan fær eitt nýtt lendi, sum kann útleggjast til ymiskar tørvir nú, og tá hugsað verður um komandi árini.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Týdningarmikið er, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í øll mál hjá Klaksvíkar kommunu. Víst verður í hesum sambandi til tey 17 heimsmálini fyri burðardyggari menning, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar Býráð taka undir við.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

Byggi- og býarplanslóggáva
Umhvørvislóggáva

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin viðmerking.

**Tilmæli:**
Málið verður við hesum sent nevndini til viðgerðar. Fyrisitingin viðmælir málinum.

**Ánanevndin 5. november 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum/skrivinum frá TF dagf. 28-10-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL og EÓP, tekur undir við Ánanevndini 5. nov. 2024.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 28-10-2024, men mælir til at varðveita ein part av fjøruni.

**Havna- og Vinnunevndin 20. november 2024:**
Nevndin tekur undir við meirilutanum í UBN, dagf. 18-11-2024.

**Tekniska Nevnd 20. november 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 20-11-2024.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2024:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá UBN 18-11-2024; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, EÓP, JS, TJL og ÓML), 2 atkvøðum ímóti (SVJ og ASB); JCC atkvøddi ikki.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 109/24
## 24/01142-1 Eykajáttan, *seinna viðgerð*

*Fundurin lokin kl. 21.00*